

*- Størsta forðingin fyri framburði – í vinnulívinum og í samfelagnum sum heild - er snævurskygni. Skulu vit køva snævurskygnið, er neyðugt við lærdómi og íblástri uttanífrá. Okkum tørvar at víðka sjónarringin alla tíðina, og tað gera vit best gjøgnum økt samstarv, segði løgmaður, Jóannes Eidesgaard, tá ið hann setti Vinnuráðstevnuna*

Mynd: Jens Kristian Vang



eisini á føroyska marknaðinum.

- Føroyskar fyritøkur fáa nú í sera stóran mun møguleikan at virka á júst sama palli sum íslendsku fyritøkurnar, og umstøðurnar eru nú uppaftur betri fyri at menna samstarvið millum føroyskt og íslendskt vinnulív.

Jóannes segði, at sáttmálin víðkar hesar møguleikar, tí arbeiðsmegi, vørur, tænastur og kapitalur kunnu nú frítt flytast landanna millum.

- Men kortini eru vit ikki komin á mál, tí týðandi avmarkingar eru í avtaluni innan fiskivinnuna.

Hann segði, at sum tvær fiskivinnutjóðir kunnu vit sjálvsagt ikki tosa um frían marknað landanna millum, so leingi forðingar eru innan okkara høvuðsvinnugrein.

- Tí fegnist eg um, at íslendingar, sum hava ynskt hesar avmarkingar, vísa vilja til at arbeiða víðari, soleiðis at forðingar í samstarvinum á fiskivinnuøkinum í framtíðini kunnu takast burtur, segði løgmaður.

### Vitan og førleikar

Jóannes Eidesgaard segði, at landsstýrið hevur gjørt fullkomiliga greitt, at tað ynskir eitt opið handilsumhvørvi og ein búskap, sum er bygdur á vitan og førleikar.

- Tað er okkara uppgáva at skapa umstøður, sum kveikja og eggja vinnuni til at royna nýggjar leiðir, tí uttan eina vælvirkandi, kreativa og nýmennandi vinnu verður torført at náa høvuðsmálinum at menna okkara vælferðarsamfelag.

Hann segði, at umframt økt vinnuligt samstarv, hevur landsstýrið við sáttmálanum skrivað undir upp á at stimbra og víðka samstarvið innan onnur týðandi øki, eitt nú mentan, umhvørvi, gransking og tøkniliga menning.

- Størsta forðingin fyri framburði – í vinnulívinum og í samfelagnum sum heild - er snævurskygni. Skulu vit køva snævurskygnið, er neyðugt við lærdómi og íblástri uttanífrá. Okkum tørvar at víðka sjónarringin alla tíðina, og tað gera vit best gjøgnum økt samstarv.

Løgmaður endurtók, at nýggi sáttmálin er fyrsta stigið hjá føroysku tjóðini út í heimin.

- Men søgan endar ikki her. Nú mugu vit eisini líta suður í heim.

At enda vísti Jóannes Eidesgaad til skaldið, Regin Dahl, sum í eini av vøkru yrkingum sinum spyr: "Hvar er rás yvir reynið?"

- Her hava vit funnið eina gongda rás, men eitt er vist; tað finnast fleiri ræsir. Men vit finna tær bert, um vit hyggja upp og hyggja út í heimin. Ikki trilvandi eftir forðingum, men við áræði leitandi eftir møguleikum. Fyrsta rásin er ruddað, so nú er at fara til gongu niðaná, helt løgmaður fyri, tá ið hann setti Vinnuráðstevnuna.

# Fiskin á línuna og prísirnar á fartelefonina beinanvegin



*Fiskin á línuna og prísirnar á fartelefonina sum sms-boð!*

**Fiskamarknaður Føroya bjóðar nú ráfiskaseljarum og fiskimonnum annars at fáa fiskaprísirnar at vita so skjótt veiðan, sum teir hava lagt upp, er seld. Fráboðanin verður send sum eini sms-boð á fartelefonina hjá fiskimanninum**

NÝGGJ TÆNASTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Allir fiskimenn, sum selja veiðina um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya, kunnu nú fáa at vita, hvussu sølan hevur gingið beint eftir, at hon er farin fram.

### Royndarskipan

- Sum eina roynd bjóða vit nú fiskimonnum at fáa fiskaprísirnar sum eini sms-boð beint eftir søluna, sigur Fiskamarknaðurin.

Lagt verður aftrat, at hóast ráfiskaseljarar nú kunnu fáa at vita um søluna beinanvegin, merkir hetta kortini ikki, at Fiskamarknaður Føroya ikki eisini – sum vanligt – sendir avreiðingarseðlarnar við postinum.

- Vit kunnu siga, at fiskimaðurin nú fær fiskin á línuna - og prísin á fartelefonina, um hann ynskir tað.

Fiskamarknaðurin hevur boðað ráfiskaseljarum frá hesi nýggju royndartænastu og teir, sum lata við seg koma við at uppgeva fartelefonnummarið og navnið á bátinum ella skipinum, eru við í hesi tænastu og fáa úrslitið av søluni sendandi sum sms-boð, tá ið veiðan er seld.

Á sms-boðunum fæst at vita, hvat ymisku fiskasløgini og støddirnar av fiski eru seld fyri.

### Spennandi at vita

- Vit halda, at tað kann vera spennandi hjá fiskimonnum og ráfiskaseljarum annars at frætta um søluna beinanvegin, siga tey á Fiskamarknaði Føroya.

Teir ráfiskaseljarar og fiskimenn annars, sum vilja hava meira at vita um nýggju royndartænastuna hjá Fiskamarknaði Føroya, kunnu venda til skrivstovu felagsins, tlf. 414141.



*- Vit halda, at tað kann vera spennandi hjá fiskimonnum at frætta um søluna beinanvegin, heldur Fiskamarknaður Føroya, sum nú fer undir eina nýggja royndartænastu*